# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Órógv á samgonguni

Landsstýrismenn sita í sjálvdrátti og klandrast alment í fjølmiðlunum. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur boðað frá kunngerð, ið kemur ferðavinnuni sera illa við. Hann hevur sína søgu, meðan landsstýriskvinnan í vinnumálum sigur sína søgu. Landsstýriskvinnan meldar so hart út, at tað er rættiliga óhugsandi, at hon ikki hevur tryggjað sær stuðul frá sínum egna baklandi. Síðan er tað stríðið um játtanina til Landssjúkrahúsið, eitt margháttligt mál, ið er torført hjá almenningi at skilja. Vit vita, hvat Landssjúkrahúsið kostar at reka, um tænastan skal vera optimal og øll tøknilig og menniskjanslig orka skal gagnnýtast til fulnar. Hví so ikki bara játta pengarnar? Vit ynskja jú øll eitt trygt og vælvirkandi Landssjúkrahús.

Her er galið við stevinum í samgonguni, og hetta kann elva til, at samgongan viknar. Omanyvir øllum hesum liggja oljuprísirnar og kreppan í fiskivinnuni sum eitt svart skýggj, ið ongin í samgonguni tykist varnast. Orkan verður heldur nýtt til klandur og markeringar. Hetta er lívshættisligt fyri samgongu av so ólíkum flokkum. Løgmaður hevur, sum tað eitur á nýføroyskum, hildið lágan profil í hesum málum eins og hann sum heild hevur gjørt lítið um seg, síðan samgongan sá dagsins ljós. Men nú er løgmaður farin at ressast. Hann hevur bæði tyktað landsstýriskonuna í mentamálum og kallað vinnumálaráðharran og fíggjarmálaráðharran til ordan. Men synd er at siga, at løgmaður talar við fastleika og myndugleika. Han heldur sum vera man, at tað er óheppið, at landsstýrisfólk keglast alment ístaðin fyri at viðgera tey ymsum málini innanhýsis í samgonguni. Løgmaður heldur somuleiðis, at tað er eitt óheppið signal at senda, at landsstýrisfólk liggja í opnum stríði sínamillum í fjølmiðlunum. Hetta hóvar als ikki løgmanni.

Løgmaður heldur, at sjálvandi kundi hann sum samgonguleiðari kravt størri disiplin í landsstýrinum, men hann heldur eisini, at tað er ein spurningur, hvussu tey ymsu landsstýrisfólkini uppfata sítt starv. Nú plagar løgmaður oftast at vanda sær um orðini, tá hann alment úttalar seg um landsstýrisfólk. Hevur hann móti sínum vana verið harður, hevur hann sum oftast eftirfylgjandi reiggjað øksini. Hansara mildu atfinngar mótvegis kombattantunum, kunnu tí bert merkja, at hann hóast alt satsar uppá hesa samgonguna. Hann fær hart hoyggj at draga. Tá landsstýrisfólk eru so ósamd frá fyrsta degi og tað liggja so nógv óloyst klandursmál og búnast, samstundis, sum tað dregur saman til stóra kreppu í høvðusvinnuni, so krevur henda støða annað slag av leiðslu. Løgmaður hevur áður prógvað, at hann *kann* sýna stór leiðsluevni. Hann má tí nú skjótt koma sær út úr skugganum av varaløgmanni og stíga í karakter sum landsins løgmaður og leiðari.

**Sosialurin**

## Hoyvíkssáttmálin – til nyttu fyri hvønn??



JOHAN DAHL
løgtingsmaður

**Er sáttmálin eitt íslendskt bluffnnummar?**
Enn einaferð í Degi og Viku í kvøld 03.06.08, fingu vit sjón fyri søgn í samband við handilsforðingar íslendinga viðv. landbúnaðarvørum.

Vit ásanna somuleiðis teirra handilsforðingar viðv. bjórinum og fiskivinnuni á landi.

Landingarnar av lodnu er annar trupulleiki, har einans 1/3 av kvotuni í íslendskum sjógvi – 10.000 tons kann veiðast til matna og framleiðast umborð á føroyskum skipum.

So hvørt sum frálíður koma vit ivaleyst at ásanna enn fleiri tekniskar forðingar á ymsum vinnuligum økjum, tí er tað nakað sum íslendingar hava dugað, so er tað at verja egin vinnulig áhugamál.

**Naivar novicir í sáttmálahøpi?**
Teir sum vóru heitastu forsprákarar fyri hesum "sonevndu 4 frælsunum" við Ísland og enntá gjøgnumtrumfaðu at seta sáttmálan í gildi við lóg og harvið seta hann oman fyri nationalari lóggávu, mugu verða ikki sørt heitir um skallan eftir at hava ásannað,- at teir vóru so naivir veruliga at trúgva, at íslendigar fóru at opna handilsligu slúsurnar fyri okkum.

**Ávaraðu um forðingarnar og ikki at loypa á bláman**
Vit vóru nakrir sum undir allari viðgerðini av hesum tá nógv umtalaða málið ávaraðu tykkum um handilsligu forðingarnar og ójavnan,- men alt skuldi loysað seg bleiv sagt.

Vit ávaraðu eisini móti at seta sáttmálan í gildi við lóg, men heldur ikki tað rein við,tíverri.

Ivist ikki í at mangir tingmenn mugu hava ringan smakk í munninum, nú avtalan fyri føroyska partin veruliga vísir lítla virði sítt.

**Íslendingar krevja sín rætt sambært sáttmálan**
Íslendigar hinvegin hava verið skjótir at kæra og krevja staðfesting av, at sáttmálin er omanfyri nationalari lóg,- hetta bleiv gjørt tá tryggingarlógin ikki bleiv ígildissett í fjør og krevja teir sín rætt sambært íslandssáttmálan - frían marknað uttan forðingar.

Niðurstøðan hesum víkjandi fyriliggur ein av fyrstu døgunum.

Teir finna seg snøgt sagt ikki í at nakrar forðingar eru fyri teirra vinnuvirksemið í Føroyum og krevja sín rætt.

**Og vit – hvat gera vit?**
Jú, vit mýkja støðuna og royna at samráðast og satsa upp á at felagsnevndin skal loysa "teknisku forðingarnar" sum íslendingar hava mótvegis okkum, livst so spyrst hvussu langt tey koma.

Kanska skuldi vit heldur gjørt bart og kravt okkara rætt – og um ikki hetta bleiv avgreitt innan ásetta tíðarfreist so annulera sáttmálan?

**Frítt slag fyri íslendingar í Føroyum**
Íslendingar hinvegin hava frítt spæl í Føroyum og hava uppkeypt og yvirtikið stórt sæð allan flutning á landi og tað sama á sjógvi og flutningskostnaðurin er farin á flog, tað kunnu allir útflytarir ásanna.

Somuleiðis hava teir keypt hópin av føroyskum vinnuvirkjum og tólum, bæði á sjógvi og landi og verið við til at pumpað virðini á hesum aktivum upp til óverulig virðir - ivaleyst tí teir hava eina langtsiktaða strategi, sum skal geva íløguna aftur og meir afturat.

**Sendikvinnan roynir at bera í bøtiflaka**
Føroyska sendikvinnan roynir at káva útyvir hesa elendigheit við at tosa um arðar hættir – samstarvshættir - eg kundi hugsað mær at spurt hana, hvørjar forðingar vit høvdu at samstarvað við íslendingar áðrenn hendan avtalan varð sett í gildi og hvør veruligi samstarvsmunurin er við íslandssáttmálanum?

Norðurlendska avtalan tryggjar okkum flestu frælsir so sum lesnað hvørt hjá ørðum, kapitalflutning, arbeiðið/flutning av fólki, sosiala trygd og samstarv á ymsum økjum í øllum norðanlondum kann nevnast.

Hvar er tann gylti møguleikin við íslandssáttmálanum fyri okkum?

**Undirbrotligheitin má steðga**
Álvaratos - er tað ikki upp á tíðina at tit sum liggja skerflatir fyri íslendingum ásanna, at alt ikki er so sára gott bert tað er íslendskt.

Ikki tí teir eru fitt fólk, tað bera vit eisini orð fyri at vera – men sum forhandlarar og forrætningsmenn eru teir meira besnissaðir má ásannast – "den kloge snyder den mindre kloge"

## Ítróttardagur fyri sinnisveik

**Tíðindaskriv**
*Sinnisbati og arbeiðsbólkurin*

Síðsta summar var skipað fyri ítróttardegi fyri sinnisveik. Dagurin var hildin á AB-vøllinum á Argjum. Tiltakið eydnaðist so mikið væl, at avgjørt er at hava ein ítróttardag hvørt summar. Eisini er avgjørt, at ítróttardagarnir skula haldast ymsastaðni í landinum.

Í ár verður dagurin hildin tann 13. juni í Sandavági. Valloyran og Síf-húsið verða karmar um tiltakið. Um veðrið ikki verður til vildar, verður flutt inn í høllina á Giljanesi.

Kappast verður í fótbólti og boccia fyrrapartin, kúluvarpi og rundbólti seinnapartin. Sostatt er møguleiki hjá luttakarunum at melda seg til tvær ítróttargreinar – eina fyrrapart og eina seinnapart.

Tiltakið byrjar kl. 9 við, at Sandavágs bygdaráð bjóðar luttakarunum til morgunmat, og Rósa Samuelsen fer at bjóða øllum vælkomnum. Eisini fer Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna –og heilsumálum at halda røðu. Eftir tað verður hitað upp og kappingarnar byrja.

Kl.14.30 verður borðhald við felagssangi. Orkestrið Menniskja fer at spæla. Eisini fer Soffí Egholm, forkvinna í Sinnisbata at halda røðu og Rósa Samuelsen fer at handa heiðursmerki.

Seinasta freist at tekna luttøku er hósdagin 5. juni og verður tað gjørt við at boða frá til Løkjukafeina, tlf. 554030 ella teldupost: judithJ@naerverk.fo

Við vón um góða luttøku.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.